Sosialurin


# Rannsóknarferð kring heimin í 8 mánaðir

**Verjuskipið Vædderen skal á rannsóknarferð runt um jørðina í átta mánaðir. Umborð vera vísindafólk, tíðindafólk og skúlanæmingar, ið fara at gera vísindaligar kanningar runt um í heiminum.**

RANNSÓKNARFERÐ
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Sum liður í fyrireikingunum til ferðina runt jørðina, hevur Vædderen verið til ymiskar umvælingar, so hann kann brúkast sum nútímans rannsóknarskip, men hesar umvælingar hava ført aðrar trupulleikar við sær. Vædderen hevur ein trupulleika við skrúvuni og er farin í dokk í Stavanger. Tí er ferðin longu seinkað.

Ætlanin var, at skipið skuldi fara úr Keypmannahavn 11. august og koma til Føroya í dag, men nú liggur tað í Stavanger. Um alt gongur væl, kann skipið fara úr Stavanger fyrrapartin í morgin, men møguliga verður tað ikki fyrr enn í annaðkvøld. Úr Stavanger tekur tað umleið eitt døgn, at sigla til Føroya.

Hetta er triðja ferð av sínum slagi, í 1845-47 var tað skipið Galathea 1, ið var á rannsóknarferð, har flest kanningar vóru gjørdar á landi. Í 1950-52 var Galathea 2 á ferð, og gjørdi djúphavskanningar. Nú er tað Vædderen á Galathea 3 rannsóknarferðini, ið vónar at gera nýggjar vísundaligar uppdagingar.




*Verjuskipið Vædderen er umbygt til Galathea 3 rannsóknarferðina*

## FERÐIN

Úr Føroyum gongur leiðin til Grønlands, har steðgað verður í fýra vikur. Mitt í september verður kósin sett í ein landsynning og til mitt í av oktobur, verður siglt ígjøgnum Miðalhavið, gjøgnum Suezveitina og til Persiska Flógvan. Har kanningar verða gjørdar í tvær vikur.

Síðan gongur leiðin til India og Teilands. Eftir hetta vera granskingarsteðgir gjørdir í Indonesisku havøkjunum, Salomonoyggjunum, Antarktis, havinum út fyri Peru, Ekvador, Galapagos, Kolumbia, tí Karibiska havinum. Á veg aftur ímóti Danmark, verður ein steðgur gjørdur á Azoronum. Eftir ætlan skal rannsóknarskipið vera aftur í Keypmannahavn mitt í apríl 2007.

# Skal gera frásøgn frá fyrsta teininum

**Anders Legarth Schmidt er tíðindamaður á Politiken, hann skal vera við fyrsta teinin á Galathea 3 rannsóknarferðini hjá Vædderen.**

RANNSÓKNARFERÐ
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Uppgáva hjá Anders Legarth Schmidt verður at siga frá, hvat hendir umborð á skipinum, og um tær vísundaligu kanningarnar og uppdagingarnar, sum vera gjørdar á ferðini.

Hann skal skriva tíðindi og reportagur til net avísina og til blaðið hjá Politiken og gera eina dagliga videodagbók frá ferðini. Eisini ætlar hann at greiða frá um hvussu lívið er umborð á skipinum.

Anders Legarth Schmidt er komin til Føroya, men tí skipið er seinkað, væntar hann, at hann skal til Stavanger í dag, og fara umborð á Vædderen har. Hann skal vera við á ferðini úr Stavanger til Føroya og víðari til Grønlands, har tey skulu sigla framvið veststrondini á Grønlandi. Anders Legarth Schmidt verður umborð inntil 8. septembur, tá hann fer í land í Nuuk.




*Anders Legarth Schmidt*




*Teinurin á Galathea 3 rannsóknarferðini hjá Vædderen*